# Bátafelagshúsið á Ba

**– Vit eiga húsið, sum tað stendur og skylda ikki eina krónu. Eingin króna er goldin í arbeiðsløn. Alt arbeiðið er gjørt sjálvboðið, og vit hava fingið dyggan stuðul frá fyritøkum í økinum, sigur formaðurin í Bátafelagnum á Bakka, Allan Poulsen. Sosialurin vitjaði í felagshølunum í gjárkvøldi**

BÁTAFELAG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bátafelagið á Bakka er stovnað 29. september 2001. Endamálið hjá felagnum er at fylkja bátaeigarar og bátaáhugað at skipa fyri felags tiltøkum og veita tænastu fyri limir og bátaeigarar annars.

Eitt av málunum, sum felagið skjótt setti út í kortið, var at byggja eini felagshús Niðri á Støð, beint norðanfyri kappróðrarneystið og beint omanfyri bátahylin á Bakka.

Húsið er nú alment tikið í nýtslu, hóast tað ikki er heilt liðugt enn. Ytri parturin er liðugur, og tað er snotuligi felagssalurin, sum er opin upp í tróðurið, eisini. Góður køkur er settur upp. Gongin er eisini liðug og almenna wc, sum er atkomiligt úr túninum.

Í hølunum verður eisini brúsa við wc, vaski og vaskimaskinu, og í fýrrúminum er ætlanin at hava lítið verkstað, har bátaeigarar kunnu loysa smærri uppgávur. Lágt loft er í øðrum partinum av bygninginum, og har er ætlanin at hava koyggjur, har vitjandi kunnu hvíla seg.

### Tikið í nýtslu

Sosialurin vitjaði í Bátafelagnum á Bakka í gjárkvøldi og hitti fýra av fimm limum í nevndini. Fyrr um kvøldið hevði alt býráðið í Runavíkar kommunu verið á vitjan og sæð hølini.

Teir fimm, sum umboða nevndina í felagnum, eru: Allan Poulsen, formaður, Hanus Lamhauge, næstformaður, Atli Leitisstein, skrivari, Janus Knudsen, kassameistari og John Tórður Sigurðsson, nevndarlimur.

Vit hittu allar hetta kvøldið undantikið Janus, sum ikki hevði høvi at vera við.

– Vit eiga húsið, soleiðis sum tað stendur, og vit skylda ikki eina krónu. Alt arbeiði hevur verið sjálvboðið, og vit hava ikki goldið eina krónu í arbeiðslønum.

Teir siga, at nógvar fyritøkur og stovnar í økinum hava stuðlað felagnum undir byggingini, og ikki minst Runavíkar kommuna hevur verið felagnum ein dyggur stuðul.

– Í samráð við kommununa hava vit bygt eitt alment wc í bygninginum, og tað var eisini í hesum sambandi, at býráðið vitjaði okkum í kvøld. Býráðið hevur goldið wc, og vit eru eisini í aðrar mátar stuðlaðir av kommununi.

Felagið hevur yvirfyri kommununi bundið seg til, at almenna wc'ið verður opið í tíðini, 1. apríl til 1. oktober, frá klokkan 08-20 á kvøldi.

Tað er annars Runavíkar kommuna, sum eigur økið undir felagshúsunum. Hetta er eitt leiguøkið, sum er vanligt í slíkum føri, tá ið bygt verður niðri við sjóvarmálan.

### Fleiri limir

Bátafelagið á Bakka hevur tilsamans 63 limir. Øll, sum hava bát ella hava áhuga fyri bátum, kunnu gerast limir, og limagjaldið er 200 krónur um árið.

– Nú húsið alment er tikið í nýtslu, vantar felagnum fleiri limir.

Teir, sum mynda felagið, dylja ikki, at teir kundu hugsað sær, at nógv fleiri limir vóru í felagnum.

– Fyrsta almenna tiltakið í húsunum, var ársveitslan, sum felagið skipaði fyri, 28. oktober í fjør. 30 mans vóru á veitsluni, og tá var felagshúsið at kalla fullsett.

Felagshølini eru ikki stór, men felagið hevur valt ikki at leypa fram av.

– Vit vilja heldur eiga tað, vit hava enn læna okkum út á sjógv, soleiðis at felagið verður ov tungt at reka.

Norðanfyri felagshúsið er eitt hampiliga stórt øki, sum kommunan hevur planerað.

– Yvirfyri kommununi hava vit sett okkara ynski fram um, at økið ikki fer til onnur endamál, tí hvør veit, um vit ikki einaferð seinni fara at byggja upp í húsini.

Nevndin sigur, at nú hølini kunnu nýtast, verður ikki meira gjørt fyribils.

– Vit fara ikki undir at gera tað, ið eftir er, fyrr enn vit eiga fyri tað. Vit ætla okkum ikki at læna pening upp á húsið, siga teir.

### Eisini undirhús

Enn hevur nevndin í Bátafelagnum ikki gjørt av, hvussu húsið, ið ætlanin eisini er at brúka sum eitt slag av undirhúsi, verður opið.

– Vit kundu hugsað okkum, at menn komu saman til prát og hugna.

Ætlanin er, at húsið verður opið leygarmorgun og ein annan dag í vikuni.

– Men hvussu hetta verður skipið, hava vit ikki tikið endaliga støðu til enn. Vit, sum eru í nevndini, hava allir lyklar, og somuleiðis hava vit eisini latið lyklar til einstakar menn, sum koma oman higar at seta seg eina løtu.

Teir siga, at meðan arbeitt hevur verið upp á húsið, hava hølini verið opin, og menn eru dotnir inn á gólvið til prát.



*Her er ætlanin at gera koyggjur, har vitjandi kunnu hvíla seg*
Mynd: Vilmund Jacobsen



*Felagshúsið er í allar mátar atkomiligt, eisini í rullistóli, við breiðari og lagaligari uppgongd*
Mynd: Vilmund Jacobsen



*Fá bilin vaskaðan, meðan tú spælir sudoku, og børnini verða ansaði*
Mynd: Vilmund Jacobsen

# Familjudagur fyri námsferð

**Flokkurin, 2.HHb á Føroya Handilsskúla, skipar í morgin fyri fleiri ymiskum tiltøkum á skúlanum til frama fyri námsferð**

TILTAK
*Beinta K. Jacobsen, starvsnæmingur*

Leygardagin, 28. januar, verður stórur familjudagur á Føroya Handilsskúla. Tá fer skúlaflokkurin 2.HHb at skipa fyri ymiskum tiltøkum til frama fyri námsferð.

Tiltakið verður frá klokkan 11-19, og skráin fyri dagin er rættiliga fjølbroytt.

### Nógv á skránni

Næmingarnir í 2.HHb bjóða sær vaska bilar við skúlan, samstundis sum fleiri tiltøk verða fyri børn.

Ein spildurnýggj hoppiborg verður á fyrsta sinni roynd við skúlan; hetta er ein sonevnd Tarzan-Hoppiborg.

Á skránni verður loppimarknaður, køkutombola, og fólk kunnu keypa sær bíligt smyrjibreyð og pylsubreyð aftur við kaffi, te ella sunkist.

Klokkan 15 byrjar eisini ein Sudoku-kapping á skúlanum.

Tey kreativu børnini sleppa eisini at royna seg hendan dagin. Skipað verður fyri eini teknikapping, har vinnarin verður funnin klokkan 18. Tá verða allar tekningarnar koyrdar í ein posa, og síðan verður ein tilvildarlig tekning tikin upp úr posanum sum gerst vinnari. Vinningurin av teknikappingini verður ein posi við góðgæti.

### Námsferð

2.HHb á Føroya Handilsskúla fer á námsferð til Athen síðst í mars, og tí vóna tey, at hópur av fólki – bæði børnum og vaksnum – koma út á skúlan leygardagin at verða við í ymisku tiltøkunum.

Næmingarnir, sum eru 20 í tali, hava frammanundan skipað fyri ymiskum tiltøkum, eitt nú køkutombola og sjavskappingum, og teir hava eisini selt skava og vinnseðlar.